## VIÐMERKINGAR

Løgtingið á vandakós!

# Uttanlandsnevndin verjir borg

**Bjørn á Heygum**



Tað gongur skjótt í hesum døgum. Uttanlandanevndin við Johan Dahl á odda skjeyt uppskotið um Íslandssáttmálan niður vegna tess, at hann løgfrøðiliga ikki var borðbarur. Hetta uppskot frá Jóannes Eidesgaard løgmanni var í veruleikanum eiin blanco heimild frá Løgtinginum at leggja lóggávuvald uttan fyri Løgtingið til eina sonevnda serkøna nevnd, soleiðis at øll lóggáva sum ikki samsvaraði leypandi broytingum í sáttmálanum, umsitingarliga skuldi kunna dømast deyð at vera.

Tíbetur fyri rættartrygdina vann hetta uppskotið um at niðurlaga lóggávuheimild løgtingsins ikki frama, og er nú steðgað av eini skilvísari nevnd til Landsstýrið hevur gjørt sítt heimaarbeiði til lýtar.

### Hovstunnilin

Næsta uppskotið sum fekk somu lagnu var uppskotið hjá Bjarna Djurholm um at leggja útreiðslurnar til Hovstunnilin uttan fyri fíggjarlógina, so Landsstýrið kundi stinga høvdið í sandin og ikki síggja lítið hugaliga fíggjarliga veruleikan í eyguni.

Seinastu tíðindini vilja so vera við, at Landsstýrið er bankað uppá pláss og við tungum huga er gingið við til, at nógv umtalaði opinleikin og gjøgnumskygni nú eisini skal fevna um Hovstunnilin.

### Barnsburðargrunnurin

Triðja gølumálið úr Landsstýrinum, sum neyvan heldur er stovureint og átti at fingið somu lagnu sum tey bæði undanfarnu, er innkrevjingin til barnsburðargrunnin,

Uppskot Landsstýrisins gongur út uppá, at gjaldið skal ásetast av landsstýrismaninum innan ávísar karmar (interval við lofti) og fara í serligan grunn umsitin av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

### Uppskotið í andsøgn við stýrisskipanina

Løgtingskrivstovan ger í hesum sambandi púra greitt, at uppskotið eftir øllum at døma er í stríð við § 41 í stýris-skipanarlógini, sum sigur at skattur bert kann ásetast við løgtingslóg, Løgtingsumsitingin definerar sostatt gjaldið til barnsburðargrunnin sum ein skatt, sum ikki kann ásetast umsitingarliga.

Formansskapurin í løgtinginium tók hetta tilmæli til eftirtektar og gjørdi staðiliga greitt, at uppskotið átti at vera víst aftur.

### Ivin kom landsstýrinum til góðar

Men løgmaður vildi ikki, at hesin ivin skuldi koma formansskapinum og løgtingsumsitingini til góðar. Hann legði trýst á samgongutingmenninar við tí sannførandi grundgeving, at ongin var við síðuna av ella omanfyri Løgtingið – Løgtingið var jú "suverent" – og ikki minst - talan var í hansara hugaheimi um eina politiskt pragmatiska loysn.

Hóast stóran iva millum samgongulimir, sum treyðugt vildu ganga ímóti egnari umsiting og formansskapi, so fekk løgmaður í eini lítlari pausu snarað meirilutan inn aftur á beint.

Góð yvirtalilsisevni hesin løgmaður - tað skal hann eiga!

So bleiv uppskotið trumfað ígjøgnum tingið við atkvøðunum frá samgongunu, undantikið limunum í formansskapinum Edmund Joensen og Óla Breckman, sum ikki vildu avnokta sína egnu umsiting soleiðis sum løgtingsmeirilutin. Og skal rætt vera rætt, so var Johan Dahl eisini loyalur mótvegis formansskapinum og atkvøddi ímóti.

### Rættartrygdin í vanda

Men hvat er hetta fyri nakað, sum gongur fyri seg í løtuni. Er rættartrygdin ikki álvarsliga í vanda, tá Løgtingið velur at fylgja landsstýrisumsitingini heldur enn egnari umsiting og formansskapi? Henda sama umsiting, sum skal verða bulverk og garantur fyri, at alt lóggávuarbeiði fer fram á lógligan og halddgóðan hátt, samstundis sum javnvágin millum løggevandi og útinnandi vald verður tryggjað.

Skal ein ivi um lóggildi av einum uppskotið um barnsburðarskipan veruliga koma útinnandi valdinum til góðar heldur enn løggevandi valdinum, kundi hóskandi verið spurt?

Eigur ein slíkur ivi um møguligt ósamsvar við stýrisskipanarlógina ikki altíð at føra til, at uppskotið verður avvíst til fullgóð vissa er fingin fyri at ongin andsøgn er millum hesa lóggávu og yvirskipaða lóggávu sum stýrisskipanarlógina? Skylda vit ikki hesi lóggávu, sum bert kann broytast av tveimum fylgjandi løgtingum, so mikið av virðing, at uppskot sum liggja á kantinum og enntá heilt uttanfyri mark, ikki bara vera trumlaði ígjøgnum. Og serstakliga í einum føri, tá Løgtingið frammanundan staðiliga er ávarðað av væl skikkaðum fólki við hollari løgfrøðiligari útbúgving í løgtingsins egnu umsiting?

### Løgtingið sýnir manglandi støðufesti

Føroya Løgting skal í øllum førum hava nakrar sera góðar grundir til at avnokta formansskapin og løgtingsskrivstovuna. Løgtingið kann heilt einfalt ikki lata seg traðkað av einum politiskt kroystum løgmanni í einum so principiellum máli. Vandi er heilt eyðsæð fyri, at ein slík avgerð leggur lunnar undir eina áhaldandi undirgraving og upploysn av heimildum og eftirlitsmyndugleika løgtingsins.

Vónandi kann Løgtingið sýna meira støðufesti eina aðru ferð, tí við hetta lag er álvarsligur vandi fyri at Løgtingið bert gerst eitt hent amboð hjá opportunistiskum landsstýrismonnum, sum onki fyrilit hava fyri grundleggjandi virðunum í rættarsamfelagnum.

# Skulu útlendingar bert vera "bundnir trælir" uttan rættartrygd?

**Ivan Egínsson Moskalenko**
*Valby*



Tey seinastu árini hava vit upplivað eina ógvusliga broyting av útlendingapolitikkinum í nógvum evropeiskum londum – og ikki minst í Danska ríkinum, sum eisini umfatar Føroyar.

Á nógvan hátt er hetta sera væl skilligt. Í Danmørk, Fraklandi, Týsklandi og nógva aðrastaðni síggja vit í dag, at manglandi eftirlit á útlendingaøkinum ígjøgnum 30-40 ár elvir til nógvar trupulleikar av ymskum slagi og enntá samanbrestir, tá ið nógvir innflytarar – serliga úr ávísum londum – ikki vilja ella kunnu integrera seg í tað nýggja samfelagið.

Nógvir av hesum fremmandu eru teimum innføddu evropearum til byrðu – fíggjarliga, tí at innflytarar ikki megna at klára seg sjálv og krevja tí penningarhjálp frá nýggja "heimlandi" sínum, men eisini málsliga, mentanarliga, og í summum førum politiskt, tá ið tey onga virðing hava fyri teimum demokratisku virðunum, sum hoyra Vesturheiminum til, og halda fram at liva, sum at tey enn vóru í londunum, ið tey eru fødd og uppvaksin í, men sum tey onkursvegna ikki vilja búgva í longur.

Tí er einki sum helst undarligt í tí, at útlendingalógin er herd - eisini í Norðurlondum. Hetta er faktiskt púra beint. Undarligt er nakað annað – at tað rakar fremmand fólk, sum eru vælvirkandi, kunnu og vilja arbeiða og í nógvum førum eru vælintegrerað málsliga og sosialt.

Ein av høvuðstreytunum fyri ein útlending at koma í eitt annað land er og skal vera, at viðkomandi megnar at forsyrgja sær sjálvum. Um hann ikki kann tað, hevur hann einki at gera í hesum landinum. Og tað skal einhvør borgari í einumhvørjum stati vera fullgreiður yvir, áðrenn hann tekur hetta rættiliga stóra stigið í lívi sínum og flytir til eitt annað land – í eina tíð ella kanska við tí fyri eyga at skapa sær eina nýggja tilveru fyri lívið.

Um útlendingur hvørki hevur arbeiði ella nakrar pengar at liva fyri – og viðkomandi veit, at hann, sum fremmandur, einki fær úr arbeiðsloysisskipanini – so flytir hann sjálvur av aftur landinum í seinasta enda! Tað gevur – eftir mínum tykki - onga meining, at landskassin skal gjalda eisini útlendingum arbeiðsloysisstuðulin - eins og tey skulu rinda til ALS (fólk í til dømis Brøðrasamkomuni kunnu jú sleppa frá at gjalda kirkjuskatt, um tey ynskja tað). Ikki fyrrenn innflytarar gerast statsborgarar í nýggja landi sínum og hetta kann – um tey eisini lúka ávísar aðrar treytir – henda í fyrsta lagi eftir 9-10 ár av fastari búseting í landinum.

Men hvussu ber tað til, at útlendingar, sum hava arbeiði um boðið - og sum arbeiðsgevarin fegin vil hava til arbeiðis – verða vístir av landinum? Hví skal tað ikki

*Framhald á síðu 12*

# Tað er ringur fuglur, sum drýtur í egið reiður

**Dan Lamhauge,**
*nevndarlimur í Unga Sjálvstýrinum*



Nú Sjálvstýrisflokkurin er komin so langt niður í tingmannatali, sum ein kann, og einasta løgtingsumboð floksins hevur brúk fyri øllum tí stuðli, sum hann kann fáa, standa "álitisfólk" floksins í røð at sleppa at siga honum alment, hvussu vánaligur hann er.

Ein av teimum "fornermaðu", fyrrverandi formaðurin í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag og limur í landsnevnd floksins, sigur í bløðunum nú um dagarnar, at moralskir spurningar onga rúmd fáa í Sjálvstýrisflokkinum. Álvaratos. Landsfundirnir 2003 og 2004 snúðu seg stórt sæð ikki um annað enn moralskar spurningar. Og um hetta ikki var nóg mikið, so kundi viðkomandi tikið tað upp í sínum egna valdømi, har hann var formaður, ella enntá í landsnevnd floksins, har viðkomandi umboðaði sítt egna valdømi. Landsnevndin er hægsti myndugleiki millum aðalfundirnar. Har er Kári P. Højgaard eisini limur. Men Carl August Arge valdi at gera um seg, valdi at fara úr flokkinum við einum braki og fáa tað at síggja út sum, at ruðuleiki valdar í Sjálvstýrisflokkinum. Ein góður máti at siga farvæl?

Annars er tað undarligt við politikki. Eg fari ikki at siga, hvat eg haldi um moralsku støðuna hjá Kára P. Højgaard ella nøkrum øðrum í Sjálvstýrisflokkinum. Men tað sær út til, at tá tað kemur til moralskar spurningar, er Havnin á einari kós, meðan restin av Føroyum er á eini aðrari. Onkustaðni har ímillum ferðast allir flokkar í dag. Umboðini úr Suðurstreymoy eru fyri, meðan hini eru í móti. Altso eru umboð úr sama flokki ymisk á máli um henda spurning. Tað haldi eg eisini vera í lagi. Vit kunnu ikki kroysta moralsk virði niður yvir høvdið á fólki. Tí eiga vit at góðtaka, at her eru vit ymisk á máli uttan at kalla hvønn annan líkt og ólíkt.

Hetta er heldur ongin trupulleiki í Sjálvstýrisflokkinum. Fólk kunnu hava teirra egnu meining í moralsku spurningunum, samvitskuspurningum. Men Sjálvstýrisflokkurin hevur bert tað eina løgtingsumboðið, so hann fær ikki havt eitt bein í hvørjum staðnum.

Sum politikkari, mást tú taka støðu til nógv stór mál, bæði fíggjarmál, sosialmál, mentamál, útlendingamál, fiskivinnumál og hvat veit eg. Men til seinasta val fingu nøkur valevni, eisini nøkur úr Sjálvstýrisflokkinum, sær viðurskiftini hjá samkyndum sum høvuðsmál. Tað er so í lagi. Men skal nøkur niðurstøða gerast út frá tí, so er tað ikki eitt evni, sum savnar tær nógvu atkvøðurnar. Og tí er hetta ein undarligur máti at fara úr einum flokki. Og hvar skal man fara? Hvønn annan flokk skal man velja?

Tað er ringur fuglur, ið drýtur í egið reiður. Eg ivist í, um hesi, sum nú melda seg úr flokkinum, nakrantíð veruliga hava kent seg sum sjálvstýrisfólk. Tað fellur teimum alt ov lætt at skaða flokkin.

Kári P. Højgaard hevur einsamallur umboðað Sjálvstýrisflokkin í nøkur ár. Tað er ikki nøkur løtt uppgáva. Men eg haldi, at hann hevur verið ein knassi. Nú mugu sjálvstýrisfólk standa saman og royna at koma við positivum ískoytum til Kára og flokkin, soleiðis at flokkurin til næsta val fær betri umboðan á løgtingi. Kári P. Højgaard fær mín fulla stuðul í arbeiðnum sum tingmaður, hóast vit ikki eru púra samdir um øll mál. Og, ikki minst, hann skal eins og hini 31 løgtingsumboðini sleppa at atkvøða eftir síni egnu samføring og eftir síni egnu samvitsku.

Við sjálvstýriskvøðu